

Mynd: Harald Pettersen/Statoil

# Statoil hevur trupult við at finna íløguhuga

**Jógvan Hugo Gardar**

10.03.2015 - 18:29

Oljan.fo

Statoil plagar áðrenn jól at geva út eitt yvirlit sum vísir hvørjar leitiætlanir sum skulu gjøgnumførast komandi árið. Hetta yvirlitið kom ikki fyri 2015.

- Orsøkin er at samstarvsfelagarnir spara, og eru ikki hugaðir at gera íløgur í løtuni, sigur leitistjórin í Statoil á norska landgrunninum, Irene Rummelhoff, í samrøðu við Teknisk Ukeblad.

- Vit hava skorið nakað í okkara egnu fíggjarætlan, og tað merkja vit sjálvandi. Men tað vit spara er munandi minni enn tað vit spara á øðrum økjum. Tav sum ávirkar leitivirksemið er, at øll sum leita á norska landgrunninum spara pengar, ikki bara Statoil, sigur Rummelhof

- Vit hava brúk fyri samstarvsfeløgum, men í dag er truplari at finna slíkar, enn tað hevur verið, sigur hon.

*Niðanfyri sæst ein samrøða sum offshore.no hevði við Tim Dodson herfyri*



Tim Dodson, leitistjóri í Statoil, í samrøðu við Offshore.no